gult cyan magenta svart

Løgtingi› vísti tyrlumálinum frá sær

Áliti› frá Vinnunevndini var til fyrstu vi›ger› í Løgtinginum í gjár. Tingmenn mettu ikki, at máli› var nóg væl vi›gjørt, og sendu ta› aftur í Vinnunevndina

TYRLUFLÚGVING
Edvard Joensen

Løgtingi› var ikki nøgt vi› vi›ger›ina, tyrlumáli› hevur fingi›. Tá áliti› frá Vinnunevndini var fyri í Løgtinginum í gjár, var› ta› beint aftur í Vinnunevndina til n‡ggja vi›ger›, tí tingmenn hildu, at máli› var ov ógreitt.

Og heldur ikki allir partar innan føroyska flúgving halda máli› vera nóg væl frágingi›.

Uni Danielsen á Flogfelag Føroya, er ein teirra, sum hevur áhugamál innan tyrluflúgving. Hann hevur samband vi› stóra skotska tyrlufelagi› Scotia, sum veitir somu tænastur, sum n‡ggja tyrlan ætlandi skal røkja.

Uni Danielsen sigur, at hann heldur okkurt vera fari› fullkomiliga av lagi, tá ein landsst‡risma›ur úr Fólkaflokkinum læsir seg fastan í, at eitt alment felag partú skal røkja flúgvingina, me›an javna›armenn vilja hava tænastuna bodna út.

Og hann dugir ikki at síggja naka› haldgott í argumentunum hjá lansst‡rismanninum, tá hesin bara heldur uppá, at tænastan skal vera føroysk.

Í fyrsta lagi veit eingin, hvat flúgvingin í veruleikanum kundi fingist fyri, tí eingin er sloppin at geva naka› tilbo›.

Uni Danielsen var sum umbo› fyri Scotia á fundi vi› Vinnunevndina, har nevndin spurdi, um felagi› kundi koma vi› eini meting av møguligum kostna›i. Ta› metti hann, at Scotia kundi. Men fekk tó seinni at vita, at ta› var ikki ney›ugt, tí Vinnunevndin hevur ikki heimild at innheinta tilbo›, og avgjørt var kortini, at Atlantsflog skuldi røkja tænastuna.

Vi› Sosialin leygardagin seg›i Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, at ta› er vanligt, at slíkar tænastur sum, hendan, talan er um, ver›a røktar av feløgum úr vi›komandi landi.

Til ta› sigur Uni Danielsen, at tá talan er um leiting og bjarging, er ta› vanliga ein herna›arlig uppgáva. Til dømis í Danmark er ta› sjóverjan, sum hevur hesar.

Men fara vit til Írlands, er ta› júst Scotia, sum hevur fingi› hesa tænastu í fríari kapping. Felagi› hevur gjørt ein fimm ára sáttmála, har tríggjar tyrlur røkja LOB tænastuna, me›an tann fjór›a alla tí›ina er til rei›ar at taka til.

Uni Danielsen metir, at eitt nú Scotia kundi veitt føroyingum eina tryggari tænastu, enn ein einsamøll tyrla, sum bert tekur níggju fólk. Og enn veit eingin, um hon kanska eisini kundi veri› betri, enn loysnin, sum landsst‡risma›urin hevur valt.

Bók um rebellin

Mánadagin fyllur Ingálvur av Reyni 80 og í hesum sambandi ver›ur bók um listamannin endurútgivin

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Ta› tykist ongan enda at taka, tann hei›ur Ingálvur av Reyni nú heystar fyri drúgvt og djarvt listarligt avrik. Og listarmanninum dámar einki hetta hóvastáki›. Seinast undirrita›i hitti Ingálv, seg›i hann, at nú var› so nógv skriva›, at nú mátti hann av landinum, hann tordi ikki at ganga longur.

Fyrsta útgávan av bókini kom í 1989, men hon var útseld beinanvegin. Myndirnar í n‡ggju útgávuni eru so at siga tær somu, men filmirnir til fyrstu bókina eru burturblivnir og tí er alt fotoarbei›i gjørt av n‡ggjum. 10 ár er drúgv tí› á tí tøknliga økinum, og tí er n‡ggja útgávan betri.

Gunnar Hoydal rithøvundur eigur tekstin í bókini, sum er skriva›ur á føroyskum, donskum og enskum. Gunnar skrivar um Ingálv:

»Ingálvur av Reyni er uppreistrarma›urin í føroyskari málningalist og strí›ist einvíst í móti at myndin ikki gert ov pen. Málningurin skal herja á, revsa og bróta ni›ur, og listama›urin vil vera vi›, at gongst ov væl at selja, so er okkurt gali›. Somulei›is mást tú aldrin vera nøgdur, tí so kanst tú líka so gjarna halda uppat. Tí tá er tú dey›ur kortini.«

Lagt til rættis hava Amariel Nor›oy, Dorthe Juul Myhre og Jógvan Isaksen.

Nú kann telefonrokningin bara minka

TeleF hevur broti› ísin og er fari› undir at veita føroyingum telefontænastur. Kundin fer at merkja ta› á pengapunginum, vi› at TeleF fer at veita bíligari tænastur, sigur Billy Hansen, stjóri

TELEFONI
Stefan í Skorini

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur, hevur ta fyrstu telefonsamrø›una hjá TeleF. Ein Errin Billy Hansen, stjóri, eyglei›ir

Mynd: Jens Kr. Vang

Ta› hevur veri› tungur bur›ur, men nú kunnu føroyingar endiliga velja, hvat útbjó›ara teir vilja brúka. Umframt Føroya Tele ver›ur eisini møguleiki at brúka TeleF, sum n‡ggja felagi› eitur.

TeleF fer í fyrsta umfari bara at veita tænastur á fastneti, men Billy Hansen vónar, at TeleF skjótt fer at kunna bjó›a kundunum fartelefon og internetsamband.

Umsókn um at veita kundum fartelefonsamband liggur hjá Fjarskiftiseftirlitinum, men ta› er ikki klárt enn. TeleF hevur eisini ætlanir um at veita internetsamband.

– Munurin fer fyrst og fremst at vera, at vit kunnu veita eina bíligari tænastu enn Føroya Tele, sigur Billy Hansen.

Prísirnir hjá TeleF vera almannakunngjørdir í næstum, og so ber til at samanbera vi› a›rar prísir, men enn ber ikki til at siga, hvussu nógv bíligari ta› ver›ur.

– Enn hava vit ikki nógvar kundar, men um vit skulu hava fleiri, mugu vit vera lække prísirnar, sigur Billy Hansen. Hann bo›a›i eisini frá, at fari› ver›ur undir eina l‡singarherfer› í næstum.

Eingin broyting

Brúkarar, sum velja at brúka TeleF, skulu ikki hugsa um at broyta ta› nummari›, tey hava nú. Heldur ikki skulu tey tr‡sta okkurt anna› tal fyrst.

Gomlu numrini ver›a var›veitt. Broytingarnar ver›a gjørdar á netinum hjá Føroya Tele, sum TeleF brúkar.

Fyri at gerast kundi hjá TeleF, skalt tú senda eina umsókn inn.

Billy Hansen sigur, at rokningarnar hjá teimum fara at vera meira nágreiniligar. Kundarnir fara at kunna síggja, hvønn tey hava ringt til og hvussu leingi tey hava veri› í telefonini henda måna›in. Kundin kann eisini fáa eina vanliga telefonrokning, um ynski er um ta›.

Fyrsta samrø›an

Hósmorgunin fór ein søgulig hending fram. TeleF hev›i sína fyrstu almennu samrø›u. Ta› var Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur, sum hev›i tann hei›urin at vera tann fyrsti, sum ringdi upp hjá TeleF.

Bygdará›sforma›urin í Vestmanna, Gunn Joensen, svara›i í hinum endanum, at »ta› hoyrist væl«.

Ta› er ikki av tilvild, at fyrsta samrø›an hjá TeleF var millum Havnina og Vestmanna. Í 1905 var fyrsta telefonsamrø›an millum bygdir í Føroyum, og ta› var júst millum hesi bæ›i stø›ini.

Ta› var Ólavur av Heyggum, sum tá dróg ein telefonka›al úr Havnini til Vestmanna. Hetta var privat framtak, og Billy Hansen seg›i seg fegnast um, at henda tænasta nú aftur ver›ur á privatum hondum.

Lang bí›ití›

Løgtingi› samtykti á vári í 1997 eina fjarskiftislóg, sum skuldi loyva kapping á økinum, og í hesum sambandi var› Telefon-verki› umskipa› til alment partafelag.

Ikki fyrr enn nú, hálvttri›ja ár aftaná, hava vit fingi› fyrsta kappingarneytan hjá Føroya Tele.

Lógin áleggur, at øll kunnu brúka kervi› hjá Føroya Tele, og TeleF má rinda fyri at brúka kervi›.

Samstarv

Í sambandi vi› at TeleF fer undir at bjó›a fólki telefontænastur, er ein samstarvsavtala gjørd vi› El & Tele, sum skal taka sær av kervinum. El & Tele skal taka sær av innleggingum og ø›rum praktiskum uppgávum.

TeleF er sostatt sett saman av Teletænastuni hjá Billy Hansen, Íslandssími, sum er ein íslendsk telefyritøka og El & Tele.

Billy Hansen hevur í fleiri ár havt Teletænastuna, sum bjó›a›i bíligar samrø›ur uttanlands, men hon er dottin ni›urfyri, nú n‡ggja felagi› er fari› í gongd.